# Fóðursølan 2008 & 2009

2008 setti sølan met við góðum 62.000 tonsum. Ein øking upp á góð 3.000 tons – ella góð 5% frá 2007. Nógv tann størsti parturin er til heimamarknaðin.

Sølan 2009 gjørdist so mikið góð, at metið frá 2008 varð tikið við knøppum 6.000 tonsum, soleiðis at samlaða sølan bleiv góð 68.000 tons. Økingin er 9,7%.




Sølan í 2009 var rættuliga lík tí í 2008. Heimamarknaðurin var júst tann sami bæði árini, meðan útflutningurin øktist frá knøppum 3.000 tonsum til knøpp 9.000 tons. Hetta bar í sær at útflutningurin í 2009 var góð 13% av samlaðu søluni. Meðan 2008 var hann 4,8%.

Vit hava nú framleitt í gott hálvt annað ár við nýggjum framleiðslutólum, og kunnu staðfesta at tann økti kapasiteturin sum skuldi fáast, er náddur. Hetta merkir eisini at vit kunnu veita eina trygga tænastu, og eru førir fyri at framleiða størri nøgdir enn vit gera í dag.